# Skuggamyndir

**Hóast eingin ivi er um, hvør upphavsmaðurin er til myndirnar, er hon pátrongjandi, henda kenslan av, at hesar myndir hjá Eyðuni av Reyni í Listaskálanum eru ópersónligar, sum kundi talan verið um eina samanrenning av málihættinum hjá fleiri føroyskum listafólkum**

UMMÆLI
*Kinna Poulsen*



### Í skugga pápans

Tað er fyrst og fremst faðir listamannin, Ingálvur av Reyni, ið kemur tær til hugs, tá tú hyggur at bæði oljumálningunum og vatnlitamyndunum hjá Eyðuni av Reyni (f. 1951). Og tó at tað á ein hátt liggur eitt ordans herðaklapp í hesi samanbering við eitt av mætastu listafólkunum, vit hava átt, man hesin sami listarligi tungvektarin, Ingálvur av Reyni neyvan vera lættasta faðirfyrimyndin. Men í øllum førum snýr tað seg um sama slag av ekspressivum,kubistiskt-abstraktum málarí við støði í náttúruupplivingum, sum er eitt høvuðsrák innan føroysku myndlistina, og sum tað nú er vorðið smart ikki at dáma. So lat bara ummælaran í hesum sambandi viðganga sína antagonistisku støðu, at hon hóast alt til eina og hvørja tíð vildi tikið hesar myndirnar hjá Eyðuni framum myndirnar hjá teimum heimligu nýsurrealistunum.

### Sofaformat

Tær flestu av myndunum hjá Eyðuni av Reyni eru avlangar í liggjandi formatinum, sum okkurt óvætti hevur doypt “sofaformat”, men sum altso er ógvuliga vanligt í landslagsmyndum, um talan er um romantikk, impressionismu, kubismu ella spildurnýggja samtíðarlist sum hesar myndirnar hjá Eyðuni av Reyni. Málningarnir eru næstan allir bygdir upp á nøkulunda sama hátt við eini beinagrind, ið strikar løriftið upp sum eina kross og bolla tekning, ið gevur fleiri avlangar flatar, harav summir eru yvirmálaðir í teirri lidnu myndini, sum ofta er merkt av grefligum mótsetningunum, ið standast av ljósum og myrkum litum í rokaligum skuggadansi. Myndevnið er tað typiskt føroyska; ein bygd ella eitt landslag við havið, ið við ógvisligum pensilsstrokum og fýrisligum litavali verður lýst við denti á tað dramatiska huglagið, sum valdar eina óveðursnátt. Tær best eydnaðu av myndunum eru merktar av einum litavali, ið er sera líkt tí hjá Ingálvi av Reyni í hansara seinastu høvuðsverkum. Hesi eru í høvuðsheitum í uttasta litlagnum merkt av einum avmarkaðum, savnandi litavali av svørtum, hvítum, reyðum og gyltum litum við øðrum litum innanfyri, ið hómast sum litbrá.

### Ímyndandi ella ikki

Hóast myndamálið er rættiliga abstraherað, eru myndirnar hjá Eyðuni av Reyni eftir mínum tykki grundleggjandi mimetiskar landslagsmyndir við forgrund (bygd), miðgrund (hav) og bakgrund (klettar, land ella brim). Tær myndirnar, ið tykjast meira abstraktar, sýnast sum heild eins og umvaksin brot úr teimum størru og meira samansettu kompositiónunum. Tí er tað eisini forvitnisligt at lesa ta umleið 10 síðurs longu ritroyndina hjá Aðalsteinn Ingólfsson, sum í nýggju bókini um Eyðun av Reyni rør framundir, at hesin listamaðurin skal vera meira víðgongt abstraktur enn eitt nú Zacharias Heinesen og Torbjørn Olsen: “Eyðun (er) ikki so áhugaður í at rokna fram litir eftir umstøðunum, men at skapa ein heim við litum, ið gongur javnfjarur við okkara heim. Tá ið hann fer at arbeiða upp á okkurt útsýni yvir land, hav og skýggj, ið vit hava tosað um, kunnu vit bara vera vís í einum: at hann onki tekur fyri givið... Sansing ovurhugi, spenningur – hetta er ikki tað, sum vit væntaðu av einum mildum og lítillátnum listamanni, ið málar í einum grýtutum og fjarskotnum staði mitt í tí kalda Atlantshavinum” (s.17 og 18). Teksturin er annars áhugaverdur, serliga í lýsingunum av litviðurskiftunum í myndunum hjá Eyðuni av Reyni: “Heldur loypur hann inn í tað ókenda og skapar eitt dramatiskt verk á einum sum oftast svørtum palli, eitt verk ið leggur dent á fjølbroyttu eginleikar litanna, ikki bara á teir útvortis, men eisini á samansetingina, glæmuna, samvirkandi eginleikarnar og rúmligu leiklutirnar. Hvat sansingini viðvíkur, gerst áskoðarin altíð varugur við tað nærum erotiska nøgdsemið, ið fæst burtur úr tí at leggja ein lit yvir ein annan, sum silki út yvir satin, ið skapar glæsiligar flatar, sum ikki vóru har frammanundan” (s.17). Tilsipingin til, at Eyðun av Reyni skal vera ávirkaður av amerikonsku Colorfield málarunum, er spennandi, men kundi verið betri undirbygd.





Bókin »Eyðun av Reyni« er útgivin av Listasavninum, har hon fæst til keyps eins og í bókabúðum um landið. Framsýningin í Listasavninum er opin fram til 1.februar 2009.

### Stjørnuhav

Permumyndin á bókini “Stjørnuhav” er vald samsvarandi teirri undirliggjandi hypotesuni um, at Eyðun av Reyni í veruleikanum nærkast reinari nonfiguratión í sínum myndum. Myndin riggar væl á permuni, tó at hon helst ikki er serliga umboðandi fyri samlaða verkið hjá Eyðuni av Reyni. Tað minnir eitt sindur um í bókini “Rød Regn”, har høvundurin brúkti hesa heldur øðrvísi myndina sum lykil at tulka samlaða verkið hjá avvarðandi listamanni, Ingálvi av Reyni. Soleiðis er tað helst hjá okkum, ið skriva um list, at sjónarháttturin viðhvørt gerst heldur einoygdur av ovurhuganum at síggja okkurt ávíst í listaverkunum.



### Undurfull umseting?

Bókin um Eyðun av Reyni er sum heild snotiliga og væl uppsett sæð burtur frá tí ævinligu, ørkymlandi samansetingini av tí føroyska, enska og danska tekstinum, sum tykist bestur á enska upprunamálinum. Í øllum førum tykjast summar av føroyskt týddu orðingunum heldur løgnar; t.d. tá talan er um savnið av franskari list á Glyptotekinum, ið á enskum er “wonderful” og á føroyskum “undrunarvert”, sum yvirritaða meir skilir sum okkurt, ið vekir undran heldur enn gleði. Í hesum sambandi skal leggjast aftrat, at tað í grundini als ikki er so galið, um ein listafólkalýsing (ella eitt ummæli!) vekir meir undran enn gleði, tí tað er kanska júst tá áskoðarin ella lesarin undrast og ivast, at listin verður flutt eitt fet fram.